# Røða
# forseta Íslands
# Guðna Th. Jóhannesson
# til minningarhaldið um
# manningina á sluppini Onnu av Toftum

## Dómkirkjan í Reykjavík
## 6. apríl 2024

Biskupur Íslands,
Føroyingar, Íslendingar,
aðrir áhoyrarar.

Vit eru komin saman her at minnast allar teir, ið lótust, tá ið føroyska sluppin Anna av Toftum sakk við Staðarberg vestan fyri Grindavík fyri einari øld síðan. Hendan vanlukkan var skakandi. Seytjan ungir menn fingu váta grøv, 29 børn vórðu faðirleys. Einkjur, fedrar og møður syrgdu horvnar menn og synir.

Í nógvum heimum í Føroyum var sorgin stór, og her í Íslandi var ein hin størsta jarðarferðin hildin í søgu Dómkirkjunnar. Havið knýtir okkum saman, oyggjalondini bæði á Atlantshavinum. Føroyingar hava leingi søkt fiskimið Íslands og fingu gjarna kjans á íslendskum skipum.

Havið gevur og havið tekur. Hetta fekk skipsmanningin á Onnu av Toftum at kenna. Nú, vit hava minningarhald fyri teimum, hava vit tí øll tey í huga, sum eru sjólátin bæði fyrr og í nýggjari tíð.

Tíbetur eru vanlukkurnar á sjónum fækkaðar, og hetta fegnast vit um og eru takksom fyri, bæði íslendingar og føroyingar. Í hesi øldini eru fleiri ár liðin uttan nakað andlát á havinum. Men sanniliga kenna vit til ta hóttan, sum býr á havinum. Í Íslandi vóru tvær vanlukkur á sjónum í fjør, og fyrr í ár sjólótust tveir menn á føroyska línuskipinum Kambi. Vit mugu tí ongantíð sovna á vaktini og skulu gera alt, vit megna fyri at bøta um trygdina hjá sjófólki.

Kæru vinir, eg takki tykkum, ið skipa fyri hesi vøkru løtu her í Dómkirkjuni í Reykjavík. Hetta er sanniliga eitt virðiligt og vakurt tiltak.